## Nærkast stjórn í Ísrael

Gongd er nú komin á samráðingarnar um at skipa nýggja stjóirn í Ísrael aftan á valið herfyri. Blaðið Ha'arets skrivar í dag, at formaðurin í Likud-flokkinum, Benjamin Netanyahu, og formaðurin í flokkinumYisrael Beiteinu, Avigdor Lieberman, eru vorðnir samdir um at skipa stjórn. Sum skilst eru flokkarnir ikki lidnir at viðgera, hvørjar ráðharrar teir skulu hava. Tað er greitt, at Netanyahu verður forsætisráðharri, og Ha'arets roknar við, at Lieberman helst verður uttanríkisráðharri. Blaðið vísir eisini á, at allir tingmenninir hjá Likud eru ikki so fegnir um at fara í samgongu við tann víðgongda Lieberman.



## Bagger slapp ikki út

Fyrrverandi stjórin í donsku fyritøkuni IT-Factory, Stein Bagger, verður verandi í varðhaldinum. Býarrætturin í Lyngby gjørdi í morgun av, at Bagger skal sita í varðhaldi fyribils til tann 27. mars. Stein Bagger, sum er skuldsettur fyri svik, fíggjarundandrátt og skjalafalsan, samstarvar nú við løgregluna, men løgreglan heldur uppá, at hann kortini hevur roynt at fjala tríggjar milliónir krónur á einari konto í stórbankanum Merrill Lynch. Eftir boðum frá danska ákæruvaldinum hava bretsku myndugleikarnir lagt hald á pengarnar, sigur DR.

# spæli nú mítt lag



*Tað er við sjálvsáliti og kraft at hesir smádreingirnir framføra ein sang í besta The Dreams stíli*



*Tey lurta við spenningi eftir trummusoloini*



*Hesin knassin spælir undir, meðan punkbólkurin hjá honum rokkar á pallinum. Hvør veit, møguliga tað hesin verður okkara Lars Ulrich (danski trummuleikarin í Metallica)*



*Dómarapanelið sigur sína meining. F.v. Jóhan Dalsgaard, Eirin Holm og Theresa Petersen*



*Børn og foreldur lurta við spenningi eftir teimum nógvu og ymisku framførslunum*

tí. Og tað vaks bara við undirtøkuni. So valdu vit at enda at gera tað ordiligt, við at fara inn í hølini hjá Filadelfia, har bæði ljóð og ljós eru í topp, sigur Majbritt Jacobsen.

Endamálið við at skipa fyri einum slíkum tiltaki hevur sjálvsagt, umframt hugnan og stuttleikan, nakar námsfrøðiligar ætlanir aftanfyri.

- Tann námsfrøðiligi parturin av hesum er, at vit kunnu skapa sjálvsvirði og sjálvsálit í tí einstaka barninum. Tað at vit kunnu læra tey at tora at stilla seg á ein pall og at framføra. Hinvegin er tað jú eisini ein lærdómur í, at børnini sjálvi skuldu gera av, um tey vildu hetta ella ikki, og at tað eisini er í lagi at siga nei, vísir Majbritt Jacobsen á.

Dirvið tóktist tó ikki at mangla millum hesi børnini. Tey tóktust púra avklárað og cool á pallinum, og tey sóu út til at njóta hvørja løtu.

### Gjørt nógv burturúr

Vikurnar uppundir hetta tiltakið hava børnini vant og skapt tónleikin. Á tann hátt eru løgini, sum tey framførdu, blivin teirra egnu.

- Og eg bleiv eisini ótrúliga yvirraskað yvir, hvussu væl hesi børnini í veruleikanum duga, greiðir Majbritt Jacobsen frá.

Í tvær ella tríggjar vikur upp undir hetta tiltakið hevur hvør krókur í dagstovninum verið nýttur til at venja í.

- Men vit hava lagt dent á, at tað ikki skuldi vera for professionelt, men heldur at tað skuldi vera eitt lívsjáttandi upplivilsi fyri børnini, og at tað skuldi gleða barnið at kunna traðka fram fyri foreldrunum og hinum børnunum, sigur Majbritt Jacobsen.